LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 121/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe, løgtingsmanni, um føroysk og donsk áhugamál á uttanríkispolitiska økinum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Metir løgmaður, at Danmark og Føroyar hava somu áhugamál, tá tað ræður um uttanríkispolitikk?
2. Metir løgmaður, at Danmark og Føroyar hava somu áhugamál, tá tað ræður um handilspolitikk við umheimin?
3. Metir løgmaður, at Danmark dugir betur at røkja føroysk uttanríkispolitisk og handilspolitisk áhugamál, enn Føroyar sjálvar?
4. Veit løgmaður ella er løgmaður kunnaður um, hvørt ætlanin er at styrkja danska uttanríkismálaráðið ella forsætismálaráðið, tá tað ræður um føroysk viðurskifti?

Svar:

Spurningur 1
Uttanríkismál eru formliga felagsmál, sum ríkismyndugleikarnir umsita. Í ávísum uttanríkismálum hava Føroyar og Danmark somu grundleggjandi áhugamál.

Men í øðrum uttanríkispolitiskum málum hava Føroyar og Danmark ikki somu áhugamál, og hesum er eisini rúm fyri í samstarvinum við Danmark. T.d. í handilspolitikki og fiskiveiðusamstarvi, har Føroyar og ES/Danmark eru hvør sín sáttmálapartur.

Spurningur 2
Tá ið um ræður handilspolitikk, eru Føroyar og ES/Danmark ikki sami sáttmálapartur og hava Danmark/ES og Føroyar ikki altíð somu áhugamál.

Spurningur 3
Føroyar skulu vera ein virkin og álítandi samstarvspartur í millumtjóða høpi. Sum ein partur av heimssamfelagnum hava Føroyar møguleikar at troyta og rættindi at brúka, men eisini skyldur at halda og ábyrgd at lyfta í felag við heimsins tjóðum. Tað eru altíð føroysk áhugamál, sum eru stýrandi fyri uttanríkispolitisku kós okkara.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Spurningur 4
Danska stjórnin hevur áður kunnað landsstýrið um, at tey vilja styrkja vitanina í donsku skipanini um føroysk og grønlendsk viðurskifti.

Harafturat eru Danmark, Føroyar og Grønland samd um, at samstarvið millum londini í ríkisfelagsskapinum skal styrkjast enn meira. Hetta er orsøkin til, at Samstarvsráðið er sett á stovn, sum skal viðgera uttanríkis- trygdar- og verjumál.

Í Tinganesi, 11. februar 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo